# Angankári

**Teitur**

Árla var um morgunin, áður upp rann sól
Tá var hin blindi Bavint snildi rigin burt á vøll

Har var leikur og har var troðin
Har vóru trodnar organspípur
Millum Jútland og Rípur

Tá var hin blindi Bavint snildi riðin skógin fram
Møtir honum mikil kempa, meiri á menskur mann

Har var leikur og har var troðin
Har vóru trodnar organspípur
Millum Jútland og Rípur

"Far tú teg til hallar heim at siga riddara frá
Nú man koma grípur á ferð, sum eitur Angankári

Har var leikur og har var troðin
Har vóru trodnar organspípur
Millum Jútland og Rípur

Far tú teg til hallar heim at siga riddara reyða
Bið hann mær til matar ætla tríati talið seyða

Har var leikur og har var troðin
Har vóru trodnar organspípur
Millum Jútland og Rípur

Har var leikur og har var troðin
Har vóru trodnar organspípur
Har var leikur og har var troðin
Har vóru trodnar organspípur
Har var leikur og har var troðin
Har vóru trodnar organspípur

Vit skulum berjast í Tyrnisdal, har býr maðkur og mý
Har skín eingin sól á uttan hægsta summarstíð

Har var leikur og har var troðin
Har vóru trodnar organspípur
Millum Jútland og Rípur

Vit skulum berjast í Tyrnisdal, har býr maðkur og mýra
Ikki heimi í borgunum, sum kattar liggja og klórast

Har var leikur og har var troðin
Har vóru trodnar organspípur
Millum Jútland og Rípur

Riðu teir í Tyrnisdal fast av miklum móði
Tá sprakk hestur Angankára, Grani sveittaði blóði

Har var leikur og har var troðin
Har vóru trodnar organspípur
Millum Jútland og Rípur

Tištěno z pisnicky-akordy.cz    Sponzor: www.srovnavac.cz - vyberte si pojištění online!